Kommunufelagið

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Dagfesting
10. oktober 2022

Okkara j.nr.
22/05103-3

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
22/12887

Ummæli av uppskoti til løgtingslóg um kapping (nýggj lóg)

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi hin 12. september 2022 omanfyrinevnda uppskot til ummælis.

Stýrið okkara hevur viðgjørt uppskotið og vegna limakommunur okkara vilja vit vísa nøkur fá, men avgerandi viðurskifti, sum krevja broyting og útgreining. Verandi uppskot inniber sostatt vansar fyri at kommunurnar í týðandi mun mugu avmarka kommunala virksemið, soleiðis sum vit kenna tað í dag.

Vit hava samskift yvirskipað við aðalráðið um hesar avleiðingar og hava fingið ta greiðu fatan, at hetta ikki eru tilætlaðar broytingar í verandi regulering. Niðanfyristandandi er tískil okkara ískoyti til tær tillagingar, sum vit vænta og vóna at landsstýrið vil gera í uppskotinum, áðrenn tað verður borið í tingið.

Kommunufelagið er sjálvandi sinnað at skifta orð við aðalráðið um, hvussu orðingarnar í lóg og viðmerkingum kunnu vera, soleiðis ótilætlaðu avleiðingar av uppskotinum kunnu beinast burtur.

Um uppskotið og skipan av almennu geirunum

Kommunufelagið skilir uppskotið soleiðis, at tað eins og áður er bygt á danska lóggávu, sum aftur byggir ásetingar hjá Evropasamveldinum.

Til hetta er alment at viðmerkja, at tað í slíkum lógarverki eisini hevur týdning at hava fyri eyga, hvussu vit í Føroyum hava skipað almennu geirarnar øðrvísi í mun til danska siðvenju.

Í Danmark eru kommunurnar sostatt í stóran mun álagdar lógarbundnar uppgávur, sum kommunurnar skulu loysa. Av tí sama er tað meiri undantakið, at kommunala virksemið er grundað á kommunufulltrúina.

Í Føroyum er útgangsstøði at kalla umvent. Kommunurnar røkja nógvar samfelagsuppgávur og vælferðartænastur, men sera fáar av teimum eru lógarbundnar. Uppgávurnar hjá

Kommunufelagið

føroysku kommununum verða tí í stóran mun loystar við heimild í kommunufulltrúini ella í lóggávu, sum gevur heimild til at kommunurnar kunnu havast við ávíst virksemi.

Felags fyri bæði londini er hinvegin, at atlit eru tikin til rættartrygdina hjá borgararum og vinnulívi. Skipanir eru settar í verk, sum tryggja at tað ikki er órímiliga tungt ella dýrt at fáa roynt flestallar kommunalar avgerðir á óheftum stað – antin í kærustovni ella hjá kommunala eftirlitsmyndugleikanum.

Dømi um kommunalt virksemi, sum ikki er álagt við lóg

Kommunurnar fáast við eina røð av uppgávum, veita ymsar tænastur og stuðla ymsum virksemi. Nøkur fá týðandi dømi kunnu í stuttum takast fram her:

Eldraøkið. Kommunurnar hava sambært lóg skyldu at skipa fyri øllum virksemi, ið er regulerað í lóg um heimatænastur, eldrarøkt v.m. Harumframt veita kommunurnar – alt eftir tørvinum í teirra øki – ymiskar tænastur, herundir tænastur móti lágum gjaldi. Hesar tænastur eru ikki lógarkravdar, men eru nakað, sum kommunurnar lógliga kunnu velja at veita.
Nógvar av ikki-lógarkravdu tænastunum verða ella kunnu verða bjóðaðar á vinnuligum grundarlagi, og harvið kann kommunan koma í eina støðu, har virksemi hennara er kappingaravlagandi.

Dagstovnar og dagrøkt. Tilboð eftir dagstovnalógini eru ikki lógarkravdar uppgávur hjá kommunum. Kommunur sum hava hesi tilboð – og tað hava tær flestu – skulu bert skipa síni viðurskifti í samsvari við lógina.
Kommunan kann tískil ringasta føri koma í tað støðu, at øll tey kommunalu ansingartilboðini antin gerast kappingaravlagandi ella at kommunan verður mett at veita kappingaravlagandi (rakstrar)stuðul.

Frítíðarlív. Flestu kommunur veita stuðul til ymiskt frítíðarlív í teirra økið. Talan kann til dømis vera um beinleiðis stuðul til ávíst virksemi, ávís tiltøk, keyp av útgerð og líknandi. Talan kann eisini vera um meiri og minni óbeinleiðis stuðul gjøgnum íløgur í viðkomandi anlegg, lága/onga húsaleigu, atgongd til høli, frítíðarkort til limagjøld og so framvegis. Hetta er lógligt kommunalt virksemi, men ongar av hesum uppgávum eru kravdar í lóg.
Nógv av vanligum frítíðarvirksemi kann hugsast at kunna vera rikið á vinnuligum grundarlagi. Tí kunnu stórir partar av tí heilt vanliga og siðbundna stuðlinum, sum kommunurnar veita hesum virksemi, gerast serliga hart rakt av verða fevnd av kappingarlógini.

Ásetingar, ið krevja tillagingar

Vit skulu serliga vísa á tríggjar ásetingar, sum tørva broytingum.

Kommunufelagið

Í fyrsta lagi er talan um § 2, stk. 2. Ásetingin regulerar tær kappingaravmarkingar sum ikki skulu rakast av forboðunum móti kappingaravlagandi avtalum (kap. 2) og misnýtslu av ráðandi støðu (kap. 3).

Undantiknar eru sostatt kappingaravmarkingar, sum eru beinleiðis ella neyðugar fylgjur av almennari regulering. Við hesum er serliga at skilja avmarkingar orsaka av lógum, kunngerðum og líknandi. Men í mun til galdandi lóg, so verður nú í viðmerkingunum ásett beinleiðis – og heldur tvítýtt – at kommunufulltrúin er at skilja sum almenn regulering, men at hon ikki er ásett við lóg og av hesi orsøk ikki fær somu undantøk:

> Kommunufultrúin er partur av hugtakið almenn regulering og loyvir kommunalfultrúin kommunum at útinna ymsar kommunalar uppgávur. Talan er tó ikki um eina skyldu áløgd við lóg, og eru kapittul 2 og 3 í kappingarlógini tí galdandi.

Vit skilja hesa viðmerking soleiðis, at kommunurnar í nógvum av teirra siðbundnu uppgávum koma í eina støðu, har verandi virksemi frameftir má metast sum kappingaravlagandi. Úrslitið kann tí verða, at virksemið má halda uppat, ella tænastan til borgaran má dýrka munandi.

Kommunufelagið mælir til at broyta viðmerkingarnar soleiðis, at tað sum minstamark er greitt, at virksemi skipað heimild í kommunufulltrúini ikki er fevnt av kapitlunum 2-3 í lógini. Í hesum sambandi eigur seinni setningur í omanfyristandandi sitati at verða strikaður.

Í øðrum lagi er talan um § 2, stk. 5. Ásetingin gevur Kappingarráðnum heimild at senda landsstýrismanninum frágreiðing um skaðilig árin, ið ávís almenn regulering hevur á kappingina, umframt koma við uppskotum um, hvussu kappingin kann fremjast.

Vit skilja hesa áseting soleiðis, at kommunurnar ikki kunnu fáa hetta ískoyti frá kappingarmyndugleikanum um, hvussu viðurskiftini hjá kommununi møguliga kundu verið skipað enn betri.

Kommunufelagið mælir til at víðkað ásetingina, soleiðis at boð eisini kunnu gevast til og svar sendast frá "avvarðandi kommunustýri". Mælt verður til, at samsvarandi krøv eru til svarini frá landsstýrisfólkum og kommunustýrum.

Í triðja lagi er talan um § 12. Ásetingin gevur kappingarmyndugleikunum møguleika at støðga og krevja stuðul afturrindaðan í tann mun stuðulin verður mettur kappingaravlagandi. Hendan heimild krevur millum annað, at stuðulin ikki lógligur sambært almennari regulering.

Kommunufelagið

Vit skilja hesa ásetingin soleiðis, at "*almenn regulering*" í hesum høpi eisini fevnir um kommunufulltrúina. Gott hevði tó verið, um hetta varð gjørt greiðari í viðmerkingunum til ásetingina.

Somuleiðis verður tað sum skilst í kommunalum málum lagt til *kommunala eftirlitsmyndugleikan* at gera av, hvat hugtakið almenn regulering fevnir um, meðan hetta í øðrum málum liggur hjá *avvarðandi landsstýrisfólki*. Hetta verður gjørt hóast hægsti samsvarandi myndugleiki til avvarðandi landsstýrisfólk ikki er kommunala eftirlitið, men *kommunustýrið*. Skal samsvar fáast í ásetingina á annan hátt, so mátti samsvarandi eftirlitsmyndugleikin hjá avvarðandi landsstýrisfólki verið sett inn – t.v.s. løgmaður – og hetta er neyvan ynskiligt.

Gjørt verður eisini vart við, at kommunala eftirlitið í aðrari lóggávu hevur víðfevndar heimildir at hava eftirlit við, at avgerðirnar hjá kommunustýrinum eru lógligar. Tí er onki praktiskt atlit, ið talar fyri, at nakar annar enn kommunustýrið skal taka avgerð hesum viðvíkjandi.

Kommunufelagið mælir til, at tað verður gjørt greitt í viðmerkingunum, at stuðul sum er veittur við heimild í kommunufulltrúini ikki verður raktur av ásetingum um kappingaravlagandi stuðul.
Kommunufelagið mælir harumframt til, at ásetingin í § 12, stk. 3, 1. pkt. verður broytt soleiðis, at avgerðin verður tikin av "avvarðandi kommunustýri".

Víst verður at enda á, at táverandi kommunufeløg og táverandi Innlendismálaráðið førdu fram líknandi viðmerkingar í ummælum sínum av núgaldandi lóg (*sí LM-110/2006*). Hesar viðmerkingar vórðu tá tiknar til eftirtektar.

Heitt verður á landsstýrið at halda fast í hesari støðu – við teimum ískoytum, sum omanfyristandandi viðmerkingar geva landsstýrinum høvi til.

Vegna
Kommunufelagið

Heðin Mortensen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri